# 10. floksnæmingar í starvsvenjing



**Seinastu tvær vikurnar hava næmingar úr Runavíkar skúli verið í starvsvenjing. Petur Meinhard Magnussen, sum hevur verið í starvsvenjing á Sosialinum, hevur hitt tríggjar næmingar, sum hava verið í starvsvenjing hjá FJM í Runavík**

STARVSVENJING
*Petur Meinhard Magnussen*

**Navn: Arnhold Troest Davidsen**
Aldur: 15.
Flokkur: 10. B.
Runavíkar skúli.
*Hví valdi tú FJM?*
- Ja, tað er tí, mær dámar sera væl jarnsmíð.
*Er hetta nakað, tú ætlar at gera í framtíðini?*
- Ja, tað er ein góður møguleiki.
*Lýs trý góð ting:*
- Arbeiðsfólkið, døgurðin, og at tað altíð er nógv at gera.

**Navn: Rógvi á Lava Olsen**
Aldur: 16.
Flokkur: 10. B.
Runavíkar skúli.
*Hví valdi tú FJM?*
- Tað er tí, at hinir valdu tað, men eisini, tí mær dámar væl at arbeiða hart.
*Er hettar nakað, tú ætlat at gera í framtíðini?*
- Ja, eg ætli mær kanska at biðja um lærupláss, men tað er bara, um eg ikki fari at søkja um at verða aspirantur í Mærsk.

Navn: Fríði Magnusson Olsen
Aldur: 16.
Flokkur: 10. A.
Runavíkar skúli
*Hví valdi tú FJM?*
- Mær dámar alt arbeiði, har man brúkar hamara og onnur amboð.
*Er hettar nakað, tú ætlar at gera í framtíðini?*
- Ja, men nú havi eg ikki verið her so leingi, so møguleikarnir eru nógvir.
*Lýs trý góð ting:*
- Sjókafein, Tonny og arbeiði sum heild.

Faroedating:

# Vil ikki hava orðið samkynd á síni heimasíðu




Bárður Bærentsen, ið er ein av monnunum handan heimasíðuna Faroedating, grundgav við sínum kristna uppvøkstri sum orsøk fyri, at hann og hinir handan síðuni, mettu tað vera skeivt, at fólk søgdu frá at tey vóru samkynd á síðuni, ið annars er til fyri at fólk skulu finna hvør annan. Hetta hendi í samrøðu í útvarpstíðindunum í gjárkvøldið.

Hóast hetta metti Bárður Bærentsen, at samkynd vóru vælkomin á síðuna. Hann metti heldur ikki, at hetta var at gera mismun, tí samkynd kundu jú nýta síðuna eins og øll onnur.

Útvarpið visti at siga frá, at ein brúkari hevði fingið sín profil strikaðan, tí viðkomandi hevði valt navnið samkynd, sum brúkara navn. Bárður Bærentsen viðgekk somuleiðis, at samkynd við hesum ongan hátt høvdu at viðmerkja, at tey eru samkynd, tí teir loyvdu heldur ikki, at tú slapp at siga, at tú vart áhugaður í tínum egna kyni. Spurdur um tú kundi skriva, at tú ikki vart áhugaður í hinum kyninum. Svaraði hann útvarpsvertinum, at tað kundi kanska var í lagi.

nud

# Eitt lýsingarátak fyri fundamentalistiskum kristindómi

**Tá heimasíðan Faroedating.fo velur at útihýsa orðinum samkynd av heimasíðu síni, so er talan um eitt innpakkað lýsingarátak fyri fundamentalistiskum kristindómi, metur Fróði Holm Knudsen markantur forsprákari fyri javnrættindum fyri samkynd**

SAMKYND
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*


*- Vit samkyndu hava simpulthen fingið høvuðsleiklutin hjá kristnu fundamentalistunum í teirra roynd at fáa fleiri við innan fyri girðingina, sigur Fróði Holm Knudsen, markantur forsprákari hjá samkyndum føroyingum*

Tá vit spurdu Fróða Holm Knudsen um eina viðmerking til tíðindini, ið Útvarpið bar í gjárkvøldið, um at samkynd ikki kundu boða frá síni kynsligu sannføring á heimasíðuni Faroedating.fo, legði hesin markanti forsprákari fyri javnrættindum fyri samkynd ikki fingrarnar ímillum.

- Hettar er jú bara enn ein roynd hjá fundamentalistunum at brúka samkynd í teirra egna stemmufiskarii. Hettar er reint spin. Og hvør veit, um ikki tann "samkynda", ið ringdi til útvarpið ikki í veruleikanum bara var ein partur í hesum miðlastuntinum, sum var lagt til rættis niður í minstu detalju? spyr Fróði og heldur fram:

- Tí ongin trýr væl av álvara, at hendan datingsíðan fer at føra til, at føroysk pør finna hvønn annan?

- Vit samkyndu hava simpulthen fingið høvuðsleiklutin hjá kristnu fundamentalistunum í teirra roynd at fáa fleiri við innan fyri girðingina, sigur hann.

- Sannleikin er jú, at onki dagblað tímir at skriva á forsíðuni, at nú er Jesus aftur á veg, vit fara singlandi niður í helviti, um vit ikki venda við og akta Guðs orð, soleiðis sum fundamentalistarnir tulka Guðs orð. Ongin bladkeypari vil rinda pengar fyri eina slíka forsíðu, og tað skapar onki orðaskifti. Ein sovorðin útsøgn hevði hægst fingið eitt lítið pláss á síðu 34 í Dimmalætting ella Sosialinum. Boðskapurin er simpulthen for ósexuttur, heldur Fróði og sigur:

- Tí skulu heilt aðrar metodir brúkast fyri at seta dagsskránna hjá fundamentalistunum – og hvat er meira leskiligt enn vit samkyndu? Vit hava jú alt – eru sexutt og eru ein minniluti, sum øll skilagóð fólk halda skulu hava javnrætt. - Við at leypa á okkum fær mann tað neyðugu øsingina og tá roykurin hevur lagt seg stendur boðskapurin eftir um, at fundamentalistarnir finnast og standa klárir við opnum ørmum at taka ímóti teimum vilstu sálunum.

- Soleiðis fingu fundamentalistarnir aftur ræði á dagsskránni í nakrar dagar. Tað keðiligasta sum kundi hent fyri fundamentalistarnar var, at allir føroyskir fjølmiðlar valdu heilt at síggja burtur frá øllum innleggjum, sum tvinna fundamentalistiskan kristindóm við samkynd. So hevði kreppa komið í í fundamentalista-høvuðsborgini har spinnið verður skapt, tí hvussu skulu vit nú lýsa við fundamentalismuni?